# Trølla-omman fingið kapping

**Trølla-Pætur er forliptur í Angelu. Tað varð staðfest í KÍ høllini leygardagin, tá tey trý stóðu fyri góðum undirhaldi fyri børnunum í umleið ein tíma. Men Trølla-omman heldur lítið um Angelu, sum nóg illa slapp at vera á pallinum fyri henni**

BARNATILTAK
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Trølla-omman gav lítið fyri Angelu og hennara gandi. Ei heldur vildi hon hoyra talan um, at Trølla-Pætur skuldi geva Angelu ein muss*

**Klaksvík:**
»Tað er øgiligt, sum tú ert pen « Tað var tað fyrsta, sum Trølla-Pætur segði, tá hann sá Angelu á pallinum leygardagin. Tey bæði komu mest sum av tilvild at standa einsamøll á pallinum eina løtu, og so var Trølla-Pætur púra vekk í Angelu.

Men tað dámdi Trøllaommuni ikki, so tá hon kom upp aftur á pallin, skuldi hon standa í millum tey bæði allatíðina. Trølla-Pætur vildi hava muss frá Angelu, men tað kostaði ikki minni enn tríggjar mussar til ommuna. Sum so kortini tá avtornaði ikki vildi, at Trølla-Pætur skuldi mussa Angelu.

Tað endaði so við, at Angela bað ommuna hyggja ein annan veg eftir onkrum spennandi, og so fekk hon sín muss frá Trølla-Pæturi.

### Harður rokkur

Men tað var ikki bara mussin, sum hetta tiltakið snúði seg um. Angela var fyrst upp á pallin, og tað fyrsta, sum hon gjørdi, var at fáa børnini nærri pallinum. Tey sótu annars øll fitt á uppsettu stólunum, men tað helt Angela vera alt ov langt frá pallinum. Og glað vórðu børnini við at sleppa nærri.

Angela fekk børnini at rópa Trølla-ommuna upp á pallin, men Trølla-Pætur tordi ikki beinanvegin. Tað gekk ein løta, so fór omman eftir honum, meðan Angela fór at finna sínar lutir fram.

Trølla-Pætur og omman framførdi eitt lag fyri og annað eftir á pallinum, og børnini tóku væl undir við teimum.

Síðani kom Angela aftur á pallin, og tá var tað, at Trølla-Pætur sá hana fyri fyrstu ferð og bleiv so øgiliga forliptur.

Angela gjørdi so ein ballón gand, sum Trølla-omman nærum oyðilegði, tí hon trúði ikki uppá gandin. Men til seinast gekk alt, sum tað skuldi kortini.

### Ov hart

Tiltakið var stuttligt fyri øll. Bæði vaksin og børn, men kanska áttu fyrireikararnir eina aðru ferð givið sær meiri far um, hvussu hart tónleikurin er frá. Nógv av børnunum hildu fyri oyruni til endans, tá tey høvdu sitið longi og lurtað eftir tí garvilla rokkinum frá Trølla-ommuni.

Eisini skal sigast, at nógv av børnunum fóru upp á gólvið at renna. Um tað var av tónleikinum ella tí tiltakið kanska dró nakað út, skal her verða ósagt.

Men stuttligt var at síggja tey renna runt saman við Angelu, meðan Rannvá og Arnfríð Lützen rundaðu tiltakið av við sanginum um Flippuna.

Aftaná fingu øll høvi at heilsa upp á Angelu, Trølla-Pætur og ommuna og Nósa, sum eisini var á vitjan. Og børnini fingu tá Sunkist, og tað mundi koma væl við hjá teimum, sum høvdu runnið ta seinastu løtuna.




*Øll flippaðu út, tá Arnfríð og Rannvá sungu um flippuna*



*Angela…..kann eg fáa ein muss*



*Børnini hugnaðu sær óført, og tað ráddi um at fáa sum mest við*



*Omman og Trølla-Pætur rokkaðu eina góða løtu á pallinum*



# Fýra tingmenn forsømdu einki

**- Sambært tingskipanini hava allir tinglimir skyldu at møta upp, og hetta skuldi verið tikið í størri álvara, heldur Vilhelm Johannesen, sum saman við trimum øðrum tingmonnum ikki hevur forsømt ein einasta tingfund síðani valið**

FRÁVERA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*









*Vilhelm Johannesen, Olav Enomoto, Alfred Olsen og Heðin Zachariasen hava verið raskastir at møta upp í tinginum síðani fyrsta tingfundin hjá nýggju ABC-samgonguni í februar. Hesir fýra hava møtt upp til allar 39 tingfundirnar og hava higartil 0% í fráveru*

Eftir eina gjøgnumgongd í gerðabókini hjá Føroya Løgtingi vórðu fýra nøvn, sum skaraðu framúr, tá uppmøtingin í tinginum varð kannað. Heðin Zachariasen, Vilhelm Johannesen, Alfred Olsen og Olav Enomoto hava møtt upp til samfullar 39 tingfundir, síðani tingmanningin 3. februar 2004 á fyrsta sinni savnaðist eftir valið 20. januar, og sostatt hava hesir fýra verið raskastir at møta upp við 0% í fráveru.

### Ov vánalig uppmøting

Vilhelm Johannesen er royndasti tingmaðurin av hesum fýra. Hann hevur sitið á tingi síðani 1988, og javnaðarmaðurin sigur, at hann altíð hevur raðfest uppmøtingina høgt, tá tingið savnast.

– Sambært tingskipanini hava allir tinglimir skyldu at møta upp, og hetta skuldi verið tikið í størri álvara, heldur Vilhelm Johannesen fyri. Hann sigur, at onnur viðurskifti sjálvsagt kunnu elva til, at ikki ber til møta upp hvørjaferð, men tá er skyldan at boða frá.

– Tað kunnu vera so nógvar orsøkir til, at tingmenn verða darvaðir, men sum heild kundi uppmøtingin eftir mínum tykki verið nógv betri, heldur Vilhelm Johannesen. Hann metir tað ikki vera neyðugt við greiðari uppmøtingarreglum fyri tingfólk, tí tingskipanin slær fast, at ein og hvør tingmaður hevur skyldu at møta upp.

– Sostatt tykist mær sum ov lítil virðing er fyri ásetingunum um uppmøting, sigur royndi tingmaðurin úr Javnaðarflokkinum.

Sum áður nevnt eru hinir tríggir tingmenninir uttan fráveru Olav Enomoto úr Sambandsflokkinum og Alfred Olsen úr Sambandsflokkinum, meðan Heðin Zachariasen úr Fólkaflokkinum hevur avrikað tað sama. Sambært Vilhelm Johannesen er ikki óvanligt, at ungir tingmenn møta væl upp fyrstu tíðina, sum støðan er við Heðin og Olav.

# Johan fór í feriu

**Við 12 av 39 forsømdum tingfundum er Johan Dahl mest fráverandi tinglimurin í tinginum, síðani ABC-samgongan fyrstu ferð savnaðist 3. februar. – Eftir alt rokið í fjølmiðlunum fór eg í eina tiltrongda feriu við familjuni, og tað er orsøkin til mína fráveru, sigur Johan Dahl**

FRÁVERA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Mest umstríddi politikarin í Føroyum hetta valskeiðið hevur helst verið Johan Dahl, og júst rokið kring fyrrverandi fiskimálaráðharran er orsøkin til, at hann er mest fráverandi tinglimurin, nú tingið er farið í summarfrí, síðani tingmanningin á fyrsta sinni savnaðist eftir valið 3. februar 2004. Johan Dahl hevur forsømt 16 tingfundir av 39 møguligum, ein frávera á 30,7%, og tá eru fyrstu 20 dagar hansara sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum ikki íroknaðir.

Við hesi fráveru er Johan Dahl sannførandi á odda í fráveru av teimum 32 tingmonnunum, og við níggju forsømdum tingfundum er Høgni Hoydal á øðrum plássi, meðan Lisbeth L. Petersen er á triðja plássi við átta forsømdum tingfundum. Felags fyri hesi bæði er, at tey eisini sita í danska fólkatinginum.

### Brúk fyri feriu

Sjálvur sigur Johan Dahl, at einfalda orsøkin til fráveru hansara er, at hann saman við familjuni valdi at fara í feriu í tríggjar vikur eftir alt rokið í fjølmiðlunum, har Johan sjálvur var høvuðspersónur.

– Familjan hevði brúk fyri eini feriu, eftir at eg hevði verið viðgjørdur í fjølmiðlunum í fleiri vikur, og tí havi eg forsømt so nógvar tingfundir, sigur Johan Dahl. Hann metir ikki avgerðina vera óseriøsa á nakran hátt, tá ferian sambært honum var neyðug og átroðkandi fyri bæði hann og familju, og tí toppar Johan Dahl fráverulistan hjá tinginum, síðani ABC-samgongan tók við.

## Johan Dahl skulkaði mest

**Av teimum 39 tingfundunum, síðani ABC samgongan fyrstu ferð savnaðist í tinginum 3. februar, hava tinglimirnir verið fráverandi so nógvar tingfundir:**

| | |
|---|---|
| Olav Enomoto | 0 |
| Vilhelm Johannesen | 0 |
| Heðin Zachariasen | 0 |
| Alfred Olsen | 0 |
| Kjartan Joensen | 1 |
| Tórbjørn Jacobsen | 1 |
| Annita á Fríðriksmørk | 2 |
| Heidi Petersen | 2 |
| Kristian Magnussen | 2 |
| Óli Breckmann | 2 |
| Henrik Old | 2 |
| Andrias Petersen | 3 |
| Hergeir Nielsen | 3 |
| Jákup Mikkelsen | 3 |
| Jenis av Rana | 3 |
| Kaj Leo Johannesen | 3 |
| Karsten Hansen | 3 |
| John Johannessen | 3 |
| Páll á Reynatúgvu | 3 |
| Anfinn Kallsberg | 4 |
| Marjus Dam | 4 |
| Edmund Joensen | 4 |
| Jørgen Niclasen | 4 |
| Bill Justinussen | 5 |
| Finnur Helmsdal | 5 |
| Gerhard Lognberg | 5 |
| Kári P. Højgaard | 5 |
| Poul Michelsen | 7 |
| Sverre Midjord | 7 |
| Lisbeth L. Petersen | 8 |
| Høgni Hoydal | 9 |
| Johan Dahl | 12 |

# Jógvan hugsar um sítt

**Jógvan við Keldu er enn einaferð í fokus orsakað av fráveru í tinginum, hesaferð sum mest fráverandi landsstýrismaðurin í ABC-samgonguni. Innlendismálaráðharrin sigur, at hann møtir upp til hvørja einastu viðgerð í tinginum av viðkomandi málum fyri hansara øki, og at hann annars heldur arbeiðir í Tinganesi**

FRÁVERA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Av teimum tilsamans 39 tingfundunum síðani ABC-samgongan tók við er Jógvan við Keldu sambært gerðabókini í tinginum mest fráverandi landsstýrismaður. Innlendismálaráðharrin hevur forsømt 17 tingfundir, síðani tingið á fyrsta sinni savnaðist 3. februar í 2004, og er hetta tveir tingfundir fleiri í fráveru enn løgmaður Jóannes Eidesgaard, sum er á øðrum plássi av manningini í Tinganesi. Raskasti landsstýrismaðurin at møta til tingfundir er mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni, sum hevur mist seks av 39 møguligum tingfundum.

Jógvan við Keldu hevur fyrr gjørt seg galdandi við fráveru í tinginum, tá uppmøtingar hava verið kannaðar av fjølmiðlunum. Fyri nøkrum árum síðani var hann sambært Dimmalætting mest fráverandi tingmaðurin, og nú tingið er farið í summarfríð, er innlendismálaráðharrin mest fráverandi landsstýrismaður til tingfundirnar.

### Møtir upp til síni mál

Sjálvur hevur Jógvan við Keldu eina einfalda orsøk til stóru fráveru hansara í tinginum.

– Eg møti hvørjaferð upp í tinginum, tá mítt økið verður viðgjørt, og tá onnur mál verða viðgjørd fyri aðrar landsstýrismenn, vil eg heldur sita í Tinganesi og arbeiða við mínum málum, greiðir Jógvan við Keldu frá. Hann sigur, at hansara aðalráð er tað minsta, og at tað tískil er náttúrligt, at hann ikki hevur verið eins nógv í tinginum og aðrir landsstýrismenn. Hann heldur tað tí hava sínar orsøkir, at hann er og hevur verið frammi í sambandi við ov nógva fráveru.

Jógvan við Keldu hevur sostatt forsømt 17 av 39 tingfundum sum landsstýrismaður í innlendismálum, tað vil siga ein frávera á 43,6%.

## Jógvan og Jógvan í hvør sínum enda

**Av teimum 39 tingfundunum, hava landsstýrismenninir verið fráverandi so nógvar tingfundir:**

| | |
|---|---|
| 1. Jógvan við Keldu | 17 |
| 2. Jóannes Eidesgaard | 15 |
| 3. Bárður Nielsen | 14 |
| 4. Bjørn Kalsø | 14 |
| 5. Bjarni Djurholm | 10 |
| 6. Hans Pauli Strøm | 9 |
| 7. Jógvan á Lakjuni | 6 |